

*Íbúgvarnir í Niger eru eitt av heimsins fátækastu fólkum*

# OD fokuserar á gloymda landið

**Hóast miðafrikanska landið Niger hvørt ár liggur á listanum millum fátækastu lond heimsins, fær landið at kalla ongan stuðul í mun til onnur fátøk u-lond, og tað kann tykjast eins og, at Niger er gloymt av umheiminum**

DAGSVERK
*Annika Hedegaard Isfeldt*

Avbjóðingin er stór og uppgávurnar eru nógvar, tá ið ein hjálparfelagsskapur tekur ta avgerð at stuðla einum landi, har nógvir aðrir stórir hjálparfelagsskapir hava gjørt av, at tørvurin er ov stórur at gera ein nøktandi mun. Hóast alt er tað júst hetta, studentahjálparfelags skapurin Operatión Dagsverk (vanliga stytt "OD") hevur valt at gera. Í samstarv við hjálparfelagsskapinum CARE, sum er millum størstu hjálparfelagsskapirnar í heiminum, fer OD sostatt í næstum at savna inn pengar til at stuðla gloymda landinum Niger. Fyrireikingarnar á høvuðsskrivstovuni hjá OD eru longu byrjaðar og eftir summarfrítíðina fara miðnámsskúlar kring Føroyar og Danmark eisini undir avbjóðandi nýggju verkætlanina.

## Menningarhjálp ístaðin fyri neyðhjálp

- Nógvir stórir hjálparfelagsskapir brúka at kalla allan pening teirra uppá neyðhjálp til fátøk lond, sum hava verið í einari kreppu. Hetta er sjálvandi sera týdningarmikið og man skal ikki gloyma hesa hjálpina, men í OD meta vit tað vera eins týdningarmikið við menningarhjálp, sigur Heiða Nolsøe úr ODbólkinum á Studentaskúlanum í Hoydølum. - Hóast tað í summum førum kann vera gott "bert" at hjálpa fólki við pengum og mati í neyðstøðum, betrar hetta ikki um støðuna í longdini. Í OD royna vit at kunna fólk innan ymisk øki, so tey sjálvi megna at skapa betri livikor til at gerast so sjálvforsýnandi sum gjørligt. Vit vilja hjálpa fólki at kunna hjálpa sær sjálvum og vit meta, at útbúgving er eitt tað týdningarmiklasta í hesum sambandi. Hevur tú eina grundvitan innan samfelagsviðurskifti, hevur tú møguleika fyri at seta spurnartekin við samfelagi og samfelagsnormarnar, tú livir undir og harviðført tú møguleikan fyri eisini at broyta títt egna lív. "At geva ein dag av útbúgvingartíðini hjá sær fyri at hjálpa einum øðrum persóni at nema sær útbúgving - og harvið geva møgueika fyri einari betri framtíð" er motto'ið hjá okkum og nýggja Nigerætlanin hevur eftir okkara tykki møguleikan fyri at røkka hesum máli.

## Hví Niger?

- Tað kann tykjast eins og, at hetta málið er ov høgt fyri ein hjálpfelagsskap sum OD, har at kalla øll arbeiðsmegin kemur frá ungum, ið eru sjálvboðin. Tað fer ivaleyst eisini at verða eitt hart arbeiði, men vit ivast onga løtu í, at tað er tað stóra arbeiði vert, sigur Heiða.

– Fyrra árið fór OD-hjálpin til at fáa kriminellar suðurafrikanskar ungdómar úr vandamikla umhvørvi teirra, meðan tað í fjør snúði seg um at upplýsa trælir í Bolivia um teirra rættindini og møguleikar. Bæði árini vóru mong, sum settu sær sjálvum spurningin, um hesar verkætlanir vórðu neyðugar og verdar at stuðla. Í ár ivist eg onga løtu í, at tey flestu klára at síggja stóra tørvin á menningarhjálp í Niger – tað er jú millum fátækastu londini í heiminum – soleiðis er tað tíverri bara.

Tað er tó ikki bert fátækradømi, sum er ein stórur trupulleiki i Niger. Tað tykist eisini trupult hjá landinum at menna seg, tí útbúgvingarmøguleikarnir í løtuni eru rættiliga vánaligir. Skúlin er í løtuni uppbygdur á ein sovornan hátt, sum ger tað trupult hjá m.a. gentum og nomadubørnum at nema sær útbúgving. Genturnar eru mangan noyddar at vera heima fyri at hjálpa mammunum við húsliga arbeiðinum, meðan namadubørnini gjøgnum árið flyta nógv runt saman við familjum teirra og tískil ikki klára at ganga í einum vanligum skúla.

Yahouza Sadissou, sum stavar frá Maradi-umráðnum, har OD-hjálpin í ár fer til, sigur um hetta: - Nógvir trupulleikar eru í almennu skúlunum; lærararnir fara í verkfall og so hvørva børnini úr undirvísingarumhvørvinum fyri at fáast við onnur praktisk ting fyri at hjálpa familjum teirra. Út av nígggju skúlamánaðunum, eru kanska tríggir ella fýra mánaðir, har undirvísing er. Hinir mánaðirnir er als eingin skúlagongd.

Ein annar stórur trupulleiki í skúlunum er, at skúlagongdin er alt ov siðbundin. Lærarin hevur einaræði í skúlastovunum og undirvísingin fer tí ofta fram á tann hátt, at lærarin stendur og heldur einarøðu fyri børnini – á fronskum. Hóast franskt er offisiella málið í Niger, duga børnini aloftast ikki franskt, orsakað av, at tey flestu tosa hausa við hús. Fyri at skula læra nakað í skúlanum, mugu børnini sostatt fyrst læra seg franskt fyri at fáa nakað burturúr undirvísingini og tað hevur í Niger víst seg at elva til, at nógv børn eru ómotiveraði til at ganga í skúla.

## Skapa eitt samfelag fyri øll

At skapa eitt samfelag, har pláss er fyri øllum og øll skulu vera á jøvnum føti er ein av høvuðsyvirskriftunum í nýggju verkætlanini í Niger. Stórir munir eru á íbúgvunum í landinum. Har eru nógv fólkasløg, trúgvirnar og mentanirnar eru ymiskar og tað kann tí kennast trupult at finna ein miðil at savna øll saman í stóra landinum.

Skúlin og útbúgving

## UM CARE DANMARK

1. CARE Danmark, sum varð sett á stovn í 1987, er partur av altjóða CARE-felagsskapinum, sum hevur deildarskrivstovur í nógvum vestanlondum.
2. CARE hevur nøkur grundleggjandi virðir í verkætlanum teirra, har m.a. arbeitt verður fyri, at u-londini fáa hjálp til sjálvhjálp, at tað verða færri fátøk menniskju kring heimin í framtíðini, at arbeiða ímóti diskrimatión, at røddin hjá teimum fátøku verður hoyrd, at i-londini samstarva við u-londini og at arbeiða fyri fyribyrgjan av konfliktum.
3. CARE Danmark hevur starvast við at menna Maradi-regiónina tey seinastu níggju árini. Hetta tíðarskeiðið hava tey ogna sær stóran kunnleika um politisku, sosialu og mentunarviðurskiftini í Niger.
4. Í 2003 fór yvirskotið frá danska tiltakinum "Børnenes ulandskalender" til arbeiðið hjá CARE í Niger. Hesin peningurin varð brúktur sum byrjan til skúlaverkætlanina í Niger, sum nýggja verkætlanin hjá OD komandi tíðina fer at arbeiða víðari við. Henda verkætlanin hevur higartil verið sera væl eydnað og hon hevur longu hjálpt nógvum børnum at fáa eina skúlagongd.